# Um 7000 børn fara at renna í dag

SKÚLARENNING

*Tíðindaskriv*

Føroya Ítrottalærarafelag bjóðar aftur í ár skúlunum at vera við til ta árligu skúlarenningina. Fyrstu ferð skipað varð fyri Norðurlendskari skúlarenning var í 1983, og er hetta sostatt 21. árið at runnið verður.

Flestu av hinum norðurlondum hava umskipað dagin soleiðis, at pláss eisini er fyri øðrum ítróttarvirksemi. Føroyar og Ísland hava tó hildið fast um renningina.

Ítróttalærarafelagið hevur í ár gjørt av at runnið verður fríggjadagin 08. oktober. Tað stendur tó skúlunum frítt fyri at renna annan dag enn tann ásetta. Sigast skal, at fleiri skúlar longu hava runnið.

Vit vita ikki, hvussu nógvir kilometrar føroysku skúlanæmingarnir leggja eftir seg henda dagin, men í fjør vóru fleiri enn 7000 rennipróvgv send skúlunum. Siga vit, at miðalnæmingurin rennur um 6-7 km., runnu føroysku børnini umleið 35-40.000 km tilsamans.

MBM hevur øll árini stuðlað tiltakinum, og hava teir verið so beinasamir at hjálpa okkum aftur í ár.

Hvørt ár verður latið prentað eitt nýtt prógv til renningina.



*Føroyskur skúlabørnini fara í dag at renna einar 35-40.000 km tilsamans*

# Kristleif Zachariasen við fløgu




Fyrsta føroyska singer/-songwriter kappingin var hildini fjør. Vinnarin, Kristleif Zachariasen, ið vann við lagnum dreymanna land, hevur gjørt skjótt av, og hevur nú longu latið eina fløgu úr hondum.

Heitið á fløguni er litleysir blettir, og talan er um eina fløgu við 10 løgum, ið hann sjálvur hevur skrivað orð og løg til.

Løgini eru øll á føroyskum.

Singer/songwriter genran er ógvuliga vælumtókt í løtuni. Allastaðni um heimin verða sangararnir við sínum kassaguitarum móttiknir við opnum ørmum. Eisini í Føroyum tykist hetta tónleikaslag sláa ígjøgnum.

Hendan fløgan kann tó ikki samanberast við stílin hjá okkara kendasta singer-/songwriter tónleikara, Teiti Lassen. Heldur minnir tónleikurin – og kanska serliga sangurin hjá Kristleifi, um tónleikin og sangin hjá Kára Sverrisyni.

Fløgan er upptikin í Útvarpi Føroya, og tað er Tutl, ið gevur út.

–eys–

- Hevur tú ein sang liggjandi í skuffuni, sum bert samlar støv, og sum eingin enn hevur hoyrt, men sum tú heldur er nokk so góður?

Singer/songwriter 2004 er ein kapping fyri føroyskar tónleikarar. Endamálið er at geva einstaklingum, ið megna bæði at skriva og framføra egnan tónleik, ein føroyskan pall.

Luttakarin skal framføra tvey nýggj føroysk løg.

Undanumfør verða hvørt leygarkvøld, til allir tilmeldaðir sangskrivarar hava framført. Tríggir luttakarar verða við í hvørjum umfari, har ein vinnari verður kosin. Føroya besti singer/songwriter verður síðani funnin í einari finalu.

Finaluvinnarin sleppur í upptøkuhøli hjá Útvarpi Føroya. Hotel Hafnia letur eisini eina virðisløn. Aftaná kappingina spæla luttakararnir fleiri løg, um teir hava hug.

Fyrsta undanumfar verður í Hafnia Lounge á Áarvegnum, leygarkvøldið 06. november kl. 21:00

SINGER / SONGWRITER 2004

Luttakara tilmelding: Hotel Hafnia, Boks 107, 110 Tórshavn, tel. 313233
Att.: Michael Jensen, e-post: mj@hafnia.fo

Heineken



MÓTTØKA



Í sambandi við stovnan av partafelagnum
Faroe Agency, verður móttøka á skrivstovuni
hjá felagnum yviri við Strond 4 í Tórshavn,
fríggjadagin tann 8. oktober frá kl. 15.00 til kl.18.00.

**Øll eru hjartaliga vælkomin.**

RUSSISKI HEIÐURSKONSULIN Í FØROYUM
OG FAROE AGENCY